Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hanna Jensen, løgtingskvinna

Svarari: Súsanna Bertholdsen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Bróstkrabbaskanningar

Spurningar:

1. Eru ætlanir um at byrja MR-bróstkrabbaskanningar í Føroyum?
2. Um ja, nær kunnu hesar skanningar fara í gongd?
3. Hvørji kundu serstakliga havt gagn av MR-bróstkrabbaskanningum í mun til mammografi, sum nýtt verður í Føroyum í dag at kanna og staðfesta bróstkrabba?
4. Hvørjir møguligir fyrimunir eru við MR-bróstkrabbaskanningum í mun til mammografi og eru nakrir vansar?
5. Hvør er metti kostnaðurin av lutvíst ella heilt at skifta frá verandi kanningarhátti og til alternativa kanningarháttin?

Viðmerkingar:
Ein krabbasjúka, sum rakar nógvar kvinnur, er bróstkrabbi, og tí mugu vit sum samfelag gera okkara besta at finna krabban so skjótt og væl sum til ber. Og tá um fyribyrgjandi átøk og viðgerð ræður, so er neyðugt at eftirmeta tað, sum verður gjørt.

Tá kvinnur skulu kannast fyri bróstkrabba í dag, so verður mammografi nýtt, tað undirritaða veit um. Vit vita, at í øðrum londum verður eisini MR-skanning nýtt til at staðfesta bróstkrabba – í størri ella minni mun. Spurningurin er, um farast skal yvir til tann háttin her í Føroyum? Og um ja, so í hvussu stóran mun? Skal mann fara eftir at kanna ávís við MR-skanning? Um so er, hvørji? Ella skal mann sum frá líður flyta allar bróstkrabbakanningar yvir til MR-skanning?

Nú tá 3Tesla skannari er i landinum og farið er í holt við at kanna fyri prostatakrabba við hesum tóli, so kemur tann nærliggjandi spurningurin: hevði tað verið ein fyrimunur eisini at farið undir bróstkrabbaskanningar í Føroyum? Hvat skal til? Hvørjir vansar kunnu vera við hesum báðum kanningarháttum? Vit vita, at mammografi kann vera pínufult, og fólk spyrja seg, um hendan kanning møguliga kann hava neiligar fylgjur. Hvussu er við neiligum fylgjum av hesum báðum kanningarháttum, mammografi og MR-skanning?

Og so er tað kostnaðurin av teimum ymsu kanningarháttunum. Hvør er munurin á kostnaði at skanna heldur enn at gera mammografi? Hvør er metti kostnaðurin av at flyta ein part ella allar bróstkrabbakanningar yvir í MR-skanning? Eitt er vist, at hesir spurningar mugu takast við í eina meting av, hvørjir kanningarhættir í framtíðini skulu nýtast í Føroyum til at finna og staðfesta bróstkrabba. Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 12. november 2025

Hanna Jensen